# Frælsi at vera ein sjálvur

Summari› er nú av álvara fari› at nærkast, ve›ri› hevur seinastu dagaranar veri› rættuliga til at liva vi›, og fólk eru so smátt farin at leggja vetrarhamin burtur av sær. Vetrarbleiku kropparnir skulu nú hava eitt sindur av kulør uppá. Ymiskt er hvussu fólk taka sær av hesum máli. Onkur leggur seg undir sólina, men ta› eru eisini onnur í taka ví›gongdari stig.

Í Klaksvík var í vikuskiftinum l‡st vi› at fólk høvdu møguleikan fyri at blíva antin tatovera›i ella pierca›i, ella bæ›i, til Nor›oyastevnu, sjálvt um ein tatovering fyri tey flestu heldur eitt sindur longur enn Nor›oyastevnan kann strekkjast, sjálvt um hon í ár er tveir dagar longur enn vanligt. Ein tatovering ella ein piercing er eisini eitt prógv um at ein hevur frælsi› til at vera ein sjálvur.

Innan Glyvur búleikast Jens. Jens er 20 ára gamal tónleikari og myndlistama›ur sum í hesum døgum strí›ist vi› seinastu skrivligu próvtøkurnar, á studentaskúlanum á Kambsdali. Jens eins og øll tey sum marka›u seg í Klaksvík, setur prís uppá at hava frælsi› til at vera ein sjálvur. Umframt at vera dugnaligur á bassguitarini so dugur Jens eisini at tekna. Ein av gó›u døgunum í farnu viku var Yngd og vitja›i Jens.

Uttan úr heimi hoyra vit um sjónvarpsrø›ina vinir, sum á ein ella annan hátt s‡nist at vera rættuliga vi›komandi fyri ung í Føroyum. Í hesum modeltí›um, har føroyskar gentur fer›ast til New York at vísa seg, er aktuelt at nevna at ein av heimsins størstu modelkappingum, Miss Universe, var hildin í vikuskiftinum.

Eftir er bert hjá okkum at ynskja øllum ein gó›an mikudag, og er hetta hervi› gjørt.

# Send inn og vinn

**3arin**

**letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.**




## Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

**Tí›indabla›i› Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

*Ábyrgdarbla›stjóri:*
Jan Müller

*Uppseting:*
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

# Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag!



# Tatoveringar og piercingar hægsti móti





*Mong eru tey kring landi› sum hava læti› seg tatovera ella fingi› gjørt eina sonevnda piercing. Í vikuskiftinum høvdu klaksvíksingar møguleikan at blíva marka›ir*

Fróði Løkságarð

Mentunarhúsi› Atlantis í Klaksvík var i í vikuskiftinum karmur um ø›rvísi mentan enn vanligt. Annika og Terji úr Salong Liljuni í Havn vóru komin nor›ur at hjálpa ungum og eldri klaksvíksingum at blíva pierca›ir og tatovera›ir.

Rættuliga nógv fólk møttu upp at fáa sær ein ella fleiri ringar, ella eina tatovering. Tey í Liljuni komu nor›ur til Klaksvíkar hósdagin, og upprunaliga ætlanin hjá teimum var bara at ste›ga tann dagin, men av tí at undirtøkan var so stór, og tey ikki sluppu at gevast fyrr enn eftir mi›nátt hóskvøldi›, avgjørdu tey at halda fram fríggjadagin, og eina løtu leygardagin eisini.

Nú er ta› sikkurt onkur sum spyr um ta› er nakar í Føroyum sum dugur at tatovera – jú ta› er ta› ! Fólkini hjá Liljuni hava veri› ni›ri á skei› í tatovering og piercing, og klára tey at veita hesa tænastu. Eitt tílíkt skei› tekur ikki langa tí›. Bara ein vika skal til á›renn tú kanst fara undir at pr‡›a fólk vi› tatoveringum og piercingum.

### Líka nógv mannfólk sum konufólk

Annika Petersen sum Yngd tosa›i vi›, seg›i at tú vóru líka nógv konufólk sum mannfólk sum høvdu áhuga fyri tiltakinum hjá teimum í Atlantis. Konufólkini fyri ta› mesta fyri at fáa sett ein ring í onkrasta›ni, og flestu mannfólkini fyri at fáa eina tatovering.

Mest vanligu piercingarnar fólk vilja hava, eru í nøsina, tunguna, varrararnar, eygnabr‡rnar og nalvan. Tó eru ta› onkur sum hava meiri intim ynskir. Annika sigur tó, at enn pierca tey í Liljuni ikki ni›an fyri mi›juna. So um tú gongur vi› einum serligum ynski um prins Albert, so noy›ist tú at bí›a naka› enn. Prísurin fyri at fáa gjørt eina piercing, liggur millum 350 og 600 kr.

### Mest kinesisk tekn

Sum sagt so var eisini stórur áhugi fyri tatoveringunum. Nógv ymisk motivir vóru at velja ímillum, men tann størsti áhugin s‡ntist tó at vera fyri teimum kinesisku teknunum. Ymisk onnur motivir vóru tó eisini at velja ímillum. Tær flestu av tatoveringunum sum blivu gjørdar í Atlantis í vikuskiftinum vóru svartar, og uttan nakrar serligar a›rar litir. Um tú hev›i okkurt serligt ynski, so bar eisini til at koma vi› sínum egnu motivum, og ta› var eisini onkur sum n‡tti henda møguleika. Prísurin fyri eina tatovering er alt eftir hvussu stór hon er. Tær bíligastu blíva gjørdar fyri 350 kr. Ta› skal tó leggjast afturat at frá teirri bíligastu til ta› d‡rastu, er eitt rættuliga langt lop.

Vit spurdu Anniku um fólk høvdu nakran møguleika at sluppa burtur úr tí aftur, um tey seinni blivu kedd av tí tey høvdu gjørt. – Vi› piercingunum er einki vandamál, teir ringarnir kunnu takast úr aftur, so er ta› vekk sigur hon. – Hjá teimum sum lata seg tatovera, er nú møguligt at velja millum tvey sløg av tatoveringum, anna› slagi› kámast burtur eftir 7 til 10 árum, og hinar vera burturbeindar vi› lasaravi›ger› um tú gerst troyttur av teimum.

### Til Su›uroyar eisini

Hetta var fyrstu fer› at tey hjá Liljuni vóru uttan fyri Havnina og tatovera›u og pierca›u. – Klaksvíksingar siga altí› at einki hendir í Klaksvík, so nú hildu vit at vit skuldu geva teimum ein møguleika at royna okkurt anna›, sigur Annika. Klaksvíksingar tóku rættuliga væl móti tiltakinum, áhugin var so stórur at ta› var trupult at sleppa framat, so ta› er ikki óhugsandi at tey koma nor›ur aftur eina a›ru fer›. Ætlanin hjá teimum úr Liljuni er eisini at fara ein túr til Su›uroyar at bjó›a sínar tænastur fram. Nær hetta ver›ur er tó ikki greitt enn. Til dagliga er tó møguligt at leggja lei›ina framvi› í Liljuni um tú vilt vera marka›ur.